# Fakligur skrivari til Etiska ráðið

Etiska ráðið søkir eftir fakligum skrivara hálva tíð at byrja 1. mai 2018.

**Starvið fevnir í høvuðsheitum um:**

- Etiska ráðið skal fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Tín uppgáva í hesum sambandi verður at savna inn tilfar og greina tilfarið fyri ráðið.
- Etiska ráðið skal skipa fyri ráðstevnum, evnisdøgum og kjakfundum fyri at varpa ljós á aktuellar etiskar spurningar. Tín uppgáva verður at skipa fyri teimum kunningarátøkum og tiltøkum, sum Etiska ráðið ynskir at seta á skrá.
- Ráðið skal lata úr hondum minst eina frágreiðing um árið. Tín uppgáva verður at skriva frágreiðingarnar í samstarvi við Etiska ráðið.
- Tín uppgáva verður eisini at hava dagligu umsitingina hjá Etiska ráðnum um hendi.

**Útbúgvingarkrøv:**
Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni.

**Vit vænta at:**

- Tú hevur viðkomandi arbeiðsroyndir
- Hevur góðan kunnleika til og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum
- Tú hevur góð samstarvsevnir og ert arbeiðssom/samur
- Tú hevur góð evni at arbeiða sjálvstøðugt, greina tilfar og ert væl skipað/ur
- Tú hevur góð evni at skriva og samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Ynskiligt við góðum kunnleika innan kunningartøkni og miðlan

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum ella kommunala økinum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya ella Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum. Starvið vísir til formannin í Etiska ráðnum.

Starvsstaður er J.C. Svabosgøta 43, 100 Tórshavn.

**Umsóknir:**
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Heilsu- og innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi 31. mars 2018, kl. 12:00.
Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:

**Heilsu- og innlendismálaráðið,**
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn
himr@himr.fo

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hildur við Høgadalsá, forkvinnu í Etiska ráðnum á tel. 262212 ella um teldupost til hildurh@olivant.fo

---

*Etiska ráðið hevur til endamáls at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, ið knýta seg til heilsufakligt virksemi á heilsuøkinum, almannaøkinum og kommunala økinum. Harumframt hevur Etiska ráðið til endamáls at gera almennar myndugleikar og borgarar betur førar fyri at taka støðu í etiskum spurningum. Ráðið er við til at byggja upp almenna vitan og førleikar um etiskar spurningar í Føroyum. Í Etiska ráðnum sita 9 limir, ið verða valdir fyri 4 ár í senn.*